# nartíð

hjá HB, tá ið teir í síðstu sekundunum undan steðginum fingu mál forerandi. HB tóktist gera fríspark í høgru, men tað mettu linjuverji og dómari ikki. Einki spurdist burturúr innlegginum. Men so var tað, at málverjin var í gávuhýri. Hann pjakaði sær við bóltinum, innskifti Hendrik Rubeksen royndi at kroysta aftasta skansan, og tá ið málverjin í staðin fyri at sparka burtur valdi at spæla til illa sperdan viðspælara, endaði tað við HB skotroynd, sum málverjin hálvbjargaði. Men ólukkutíð fyri Skála, so sprakk returbólturin í krovið á Nenad. Miðvallarin royndi alt tað, hann kundi, at bjarga støðuni, men bólturin vann inn um málstrikuna.

Harvið hevði HB javnað og undir hvíldini fingið sinniliga yvirskotið, og tá ið teir harafturat eftir steðgin skuldu hava lotið undan, kundi tað sæð út sum um, at fyritreytirnar fyri HB sigri vóru góðar.

Seinna umfarið var tætt og javnt. Báðir partar royndu at spæla heldur enn at sparka, og hóast leikdygdin lækkaði eitt sindur, tá ið møðin fór at gera um seg, so var talan um fína fótbóltsuppgerð, sum helt áskoðarunum á nálum, inntil góði dómarin hevði brikslað fyri síðstu ferð.

Talan var ikki um heilt upplagdar málmøguleikar, men tað var um reppið, at Rói Jacobsen vann fram til flatt innlegg úr vinstru frá Jónhardi Frederiksberg, eftir at uppspælið hevði verið fínt, Bárður Johannesen var tvær ferðir fyrri á framleggingum enn Jónhard Frederiksberg, sum var um at renna frá HB miðverjuni, og í hinum endanum var Hendrik Rubeksen tætt við eftir horna.

HB hevði eyka álopstrumfar at spæla út, tá ið teir settu Tór-Ingar Akselsen og Una Arge inn, men teir komu ikki nærri enn nær við og næstan eftir deyðbóltsstøður.

Skála kundi havt avgjørt fyrsta hálva tíman. Tá kendu teir ikki sína vitjunartíð, og í heyst kann tað fara at vísa seg dýrt, at teir ikki gjørdu tað, og at teir í síðstu sekundunum í fyrra umfarinum vóru ov blíðir við gestirnar.

## Álitisváttanin kemur væl við

**Jákup á Borg fegnast um, at nýggi HB venjarin undir øllum umstøðum vil hava sínar menn at spæla fótbólt, og at fremstu menninir hava fingið so leysar teymar**

HB
*Jóannes Hansen*

Jákup á Borg var - á sama hátt sum liðfelagarnir vóru tað - nøgdur við at hava eitt stig við aftur til Havnar.

- Skála er eitt fínt fótbóltslið. Teir spæla væl, og teir pressa okkum støðugt, tá ið vit royna at byggja upp. Fyrstu løtuna vóru vit á afturpartinum, men vit mentust, og sum 2. hálvleikur leið haldi eg, at vit vóru eins tætt við at fáa sigursmálið, sum teir vóru tað, heldur álopsspælarin, sum sigur seg fegnast um mátan, sum HB liðið nú roynir at fáa stig uppá:

- Julian Hansen hevur givið okkum boð um at spæla fótbólt. Hann heldur seg hava gott spælaratilfar at spæla, og so heldur hann onga orsøk vera at sparka. Eisini hevur hann lagt um, so vit nú eru tríggir har frammi. Vit hava leysar teymar at flyta okkum úr síðu og í síðu. Venjarin vísti eisini við útskifting eftir stóran hálvan tíma, at hann einki hevur ímóti at taka konsekvensirnar beinanvegin. Hann kundi havt skift fleiri út, tí fyrstu løtuna vóru vit fjáltusstungnir, men tíbetur vunnu vit á hesum.

*Hvussu sást tú málið, sum tit fingu?*

- Satt at siga so hevði eg roknað við, at dómarin fór at bríksla fyri frísparki til teirra, eftir at eg hevði verið í nærdysti við ein teirra. Og eg haldi eisini, at tað var púra óneyðugt, at bólturin fór inn um strikuna. Eg skilji ikki, at teir ikki fingu hann aftur, tí hann hevði onga ferð móti vindinum, sigur Jákup á Borg.

*Hvussu verður nú?*

- Hjá okkum ræður um at vinna hvørja ferð. Vit eru tvey stig aftanfyri Skála og eitt stig aftanfyri B36, sum vit skulu spæla ímóti. Vit mugu gera okkara og so fáa vit at síggja, hvussu langt tað fer at bera.

# Allir føroyingarnir millum áskoðararnar

**Eingin av føroysku landsliðsspælarunum var á vøllinum í vikuskiftinum, tá ið FCK legði uppaftur meiri sjógv millum seg og hini**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Tað gongur strúkandi hjá FCK. Hóskvøldið megnaðu teir 1-1 í UEFA Cup á útivølli móti Hamburg SV, og sunnudagin smurdu teir FCM av í Parkini. Teir vóru á odda 3-0, tá ið vanliga leiktíðin var farin, men so pyntaði David Nielsen um fyri FCM. Stóri maðurin á FCK liðnum var Álvaro Santos. Hann skoraði tvey mál, og triðja FCK málið skoraði veteranurin Peter Møller.

Brøndby og FCK plaga at kappast um DM, og soleiðis hevur tað eisini sæð út til, at tað skal ganga í hesum kappingarárinum. Í annaðkvøld skal FCK spæla í Brøndby, og um tað ikki eydnast heimaliðnum at fáa úrtøku og helst at vinna, so verður sera torført at fáa fatur á FCK.

Sunnudagin tapti Brøndby 3-1 í Viborg. Hóskvøldið vann Brøndby 2-0 á heimavølli í UEFA Cup. Fleiri lyklaspælarar eru skaddir, og tað sást aftur á avrikunum í superliguni. Viborg telist millum tey, sum eru í hølunum á Brøndby.

Føroyskir spælarar eru í Horsens, SønderjyskE og AaB. Felags fyri teir tríggjar - ávikavíst Johan B. Hansen, Rógva Jacobsen og Súna Olsen - var, at eingin teirra var á vøllinum í vikuskiftinum.

AaB spældi leygardagin í Århus, og har fingu teir endiliga fulla úrtøku, eftir at tað leingi hevði verið soltið. AaB vann 4-2. Súni Olsen var ikki á liðnum. Á heimasíðuni hjá AaB varð undan vikuskiftinum sagt, at Súni var smáskaddur.

SønderjyskE átti í fyrsta dystinum við nýggja venjaranum, Morten Brun, við róðrið heimavøll móti Esbjerg. Hjá Esbjerg hevur tað hilnast heilt illa fyrsta partin av kappingarárinum. Tað hevur gingið illa at fáa stig, og tað hevur gingið illa at fáa mál. Hesa ferð eydnaðist tað at vinna 1-0.

Harvið er SønderjyskE niðanfyri keðiliga strikuna. Tað eru teir saman við Horsens, sum uttan Johan Byrial Hansen á liðnum legði rygg til stórtap í Farum. FCN vann við ikki minni enn 5-0!

Heldur ikki hjá OB hevur tað hilnast nakað serligt. Men hesa ferð royndist tað væl. Á heimavølli vunnu teir 3-1 móti Silkeborg. Miti skoraði tvey mál, og økti harvið um metið sum besti útlendski málskjúttin í superliguni. Tað metið tók hann fyri nøkrum vikum síðani frá Toda Jónsson.

**Danska Sas-ligan**

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 FCK (M) | 9 | 8 | 1 | 0 | 16 | 4 | 12 | 25 |
| 2 Brøndby (S) | 9 | 6 | 1 | 2 | 17 | 10 | 7 | 19 |
| 3 Viborg | 9 | 5 | 2 | 2 | 19 | 11 | 8 | 17 |
| 4 OB | 9 | 4 | 3 | 2 | 15 | 10 | 5 | 15 |
| 5 FC Nordsj. | 9 | 3 | 3 | 3 | 15 | 11 | 4 | 12 |
| 6 FCM | 9 | 3 | 3 | 3 | 16 | 18 | -2 | 12 |
| 7 AaB | 9 | 2 | 4 | 3 | 11 | 11 | 0 | 10 |
| 8 Esbjerg | 9 | 2 | 2 | 5 | 10 | 12 | -2 | 8 |
| 9 AGF | 9 | 2 | 2 | 5 | 14 | 19 | -5 | 8 |
| 10 Silkeborg | 9 | 2 | 2 | 5 | 8 | 17 | -9 | 8 |
| 11 SønderjyskE | 9 | 2 | 1 | 6 | 11 | 19 | -8 | 7 |
| 12 AC Horsens | 9 | 1 | 4 | 4 | 2 | 12 | -10 | 7 |

Føroyskir leikarar: Johan Byrial Hansen (AC Horsens), Súni Olsen (Aab), Rógvi Jacobsen (SønderjyskE)

**Danska 1. deild**

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kolding | 8 | 6 | 0 | 2 | 17 | 11 | 6 | 18 |
| 2 Randers FC | 7 | 5 | 0 | 2 | 15 | 7 | 8 | 15 |
| 3 Fremad Am. | 8 | 4 | 3 | 1 | 19 | 13 | 6 | 15 |
| 4 NFA | 8 | 4 | 2 | 2 | 16 | 10 | 6 | 14 |
| 5 Køge | 8 | 4 | 2 | 2 | 16 | 12 | 4 | 14 |
| 6 Herfølge | 8 | 4 | 1 | 3 | 18 | 10 | 8 | 13 |
| 7 Lyngby | 8 | 4 | 1 | 3 | 18 | 13 | 5 | 13 |
| 8 Vejle | 7 | 3 | 2 | 2 | 10 | 8 | 2 | 11 |
| 9 FC Fredericia | 8 | 3 | 1 | 4 | 14 | 14 | 0 | 10 |
| 10 Ølstykke | 8 | 3 | 1 | 4 | 10 | 11 | -1 | 10 |
| 11 Brabrand | 8 | 3 | 1 | 4 | 6 | 14 | -8 | 10 |
| 12 Frem | 7 | 2 | 3 | 2 | 13 | 10 | 3 | 9 |
| 13 HIK | 8 | 1 | 6 | 1 | 10 | 9 | 1 | 9 |
| 14 AB | 8 | 1 | 2 | 5 | 8 | 20 | -12 | 5 |
| 15 Brønshøj | 7 | 1 | 1 | 5 | 6 | 20 | -14 | 4 |
| 16 Skjold | 8 | 0 | 2 | 6 | 6 | 20 | -14 | 2 |

Føroyskir leikarar: Gunnar Nielsen Jón Rói Jacobsen, Jónas Þór Næs (Frem), Andrew av Fløtum (Fremad Amager), Christian Holst Lamhauge (Lyngby), Atli Gregersen (Skjold)

**Norska Elituserian**

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Vålerenga | 21 | 13 | 5 | 3 | 38 | 19 | 19 | 44 |
| 2 Start | 20 | 12 | 5 | 3 | 37 | 22 | 15 | 41 |
| 3 Viking | 21 | 11 | 4 | 6 | 32 | 26 | 6 | 37 |
| 4 Lillestrøm | 21 | 11 | 4 | 6 | 31 | 25 | 6 | 37 |
| 5 Lyn Oslo | 21 | 9 | 7 | 5 | 28 | 19 | 9 | 34 |
| 6 Odd Grenland | 21 | 9 | 3 | 9 | 22 | 35 | -13 | 30 |
| 7 Brann | 20 | 8 | 5 | 7 | 36 | 23 | 13 | 29 |
| 8 HamarKam | 21 | 7 | 4 | 10 | 24 | 29 | -5 | 25 |
| 9 Molde | 21 | 7 | 3 | 11 | 32 | 40 | -8 | 24 |
| 10 Fredrikstad | 21 | 6 | 5 | 10 | 27 | 36 | -9 | 23 |
| 11 Tromsø | 21 | 4 | 9 | 8 | 23 | 27 | -4 | 21 |
| 12 Rosenborg | 21 | 6 | 3 | 12 | 34 | 40 | -6 | 21 |
| 13 Bodø/Glimt | 21 | 5 | 5 | 11 | 25 | 34 | -9 | 20 |
| 14 Aalesund | 21 | 3 | 8 | 10 | 19 | 33 | -14 | 17 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (Start)

**Norska 1. Deild**

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stabæk | 24 | 15 | 7 | 2 | 44 | 18 | 26 | 52 |
| 2 Sandefjord | 24 | 15 | 5 | 4 | 44 | 28 | 16 | 50 |
| 3 Moss | 24 | 13 | 7 | 4 | 42 | 21 | 21 | 46 |
| 4 Bryne | 24 | 13 | 6 | 5 | 50 | 26 | 24 | 45 |
| 5 Hønefoss BK | 24 | 13 | 5 | 6 | 40 | 32 | 8 | 44 |
| 6 Pors Grenland | 24 | 11 | 10 | 3 | 40 | 28 | 12 | 43 |
| 7 Kongsvinger | 24 | 9 | 4 | 11 | 34 | 36 | -2 | 31 |
| 8 Sogndal | 24 | 8 | 7 | 9 | 39 | 44 | -5 | 31 |
| 9 Strømsgodset | 24 | 8 | 5 | 11 | 33 | 37 | -4 | 29 |
| 10 Hødd | 24 | 8 | 4 | 12 | 39 | 45 | -6 | 28 |
| 11 Mandalskam. | 24 | 6 | 8 | 10 | 37 | 38 | -1 | 26 |
| 12 Follo | 24 | 7 | 5 | 12 | 33 | 41 | -8 | 26 |
| 13 FK Tønsberg | 24 | 6 | 4 | 14 | 29 | 43 | -14 | 22 |
| 14 Skeid | 24 | 6 | 4 | 14 | 33 | 51 | -18 | 22 |
| 15 Løv-Ham | 24 | 6 | 4 | 14 | 21 | 42 | -21 | 22 |
| 16 Alta | 24 | 3 | 5 | 16 | 22 | 50 | -28 | 14 |

Føroyskir leikarar: Atli Danielsen (Sogndal)

**Íslendska Landsbankadeildin**

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 FH | 18 | 16 | 0 | 2 | 53 | 11 | 42 | 48 |
| 2 Valur | 18 | 10 | 2 | 6 | 29 | 16 | 13 | 32 |
| 3 ÍA | 18 | 10 | 2 | 6 | 24 | 20 | 4 | 32 |
| 4 Keflavík | 18 | 7 | 6 | 5 | 28 | 31 | -3 | 27 |
| 5 Fylkir | 18 | 8 | 2 | 8 | 28 | 28 | 0 | 26 |
| 6 KR | 18 | 8 | 1 | 9 | 22 | 24 | -2 | 25 |
| 7 Grindavík | 18 | 5 | 3 | 10 | 23 | 41 | -18 | 18 |
| 8 ÍBV | 18 | 5 | 2 | 11 | 18 | 30 | -12 | 17 |
| 9 Fram | 18 | 5 | 2 | 11 | 19 | 32 | -13 | 17 |
| 10 Þróttur | 18 | 4 | 4 | 10 | 21 | 32 | -11 | 16 |

Føroyskir leikarar: Rógvi Jacobsen (KR) (læntur til SønderjyskE), Símun Samuelsen (Keflavík)

**Enska League Championship**

| | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Sheff Utd. | 9 | 8 | 0 | 1 | 20 | 9 | 11 | 24 |
| 2 Reading | 9 | 6 | 2 | 1 | 18 | 6 | 12 | 20 |
| 3 Watford | 9 | 5 | 2 | 2 | 19 | 12 | 7 | 17 |
| 4 Luton | 9 | 5 | 2 | 2 | 12 | 8 | 4 | 17 |
| 5 Stoke | 9 | 5 | 1 | 3 | 10 | 11 | -1 | 16 |
| 6 Southampton | 9 | 3 | 5 | 1 | 12 | 9 | 3 | 14 |
| 7 Leeds | 8 | 4 | 2 | 2 | 10 | 7 | 3 | 14 |
| 8 Wolverhampton | 9 | 3 | 4 | 2 | 10 | 9 | 1 | 13 |
| 9 Derby | 9 | 2 | 6 | 1 | 13 | 11 | 2 | 12 |
| 10 Preston | 9 | 3 | 3 | 3 | 10 | 9 | 1 | 12 |
| 11 QPR | 9 | 3 | 3 | 3 | 7 | 10 | -3 | 12 |
| 12 Cardiff | 8 | 3 | 2 | 3 | 11 | 12 | -1 | 11 |
| 13 Ipswich | 9 | 3 | 2 | 4 | 8 | 13 | -5 | 11 |
| 14 Crystal Palace | 8 | 3 | 1 | 4 | 10 | 9 | 1 | 10 |
| 15 Leicester | 9 | 2 | 4 | 3 | 10 | 12 | -2 | 10 |
| 16 Coventry | 9 | 1 | 6 | 2 | 10 | 12 | -2 | 9 |
| 17 Norwich | 9 | 2 | 3 | 4 | 8 | 10 | -2 | 9 |
| 18 Hull | 9 | 2 | 3 | 4 | 5 | 7 | -2 | 9 |
| 19 Brighton | 9 | 1 | 5 | 3 | 10 | 13 | -3 | 8 |
| 20 Crewe | 9 | 1 | 5 | 3 | 10 | 14 | -4 | 8 |
| 21 Plymouth | 9 | 2 | 2 | 5 | 7 | 13 | -6 | 8 |
| 22 Millwall | 9 | 2 | 1 | 6 | 8 | 16 | -8 | 7 |
| 23 Burnley | 9 | 1 | 3 | 5 | 13 | 15 | -2 | 6 |
| 24 Sheff Wed | 8 | 1 | 3 | 4 | 4 | 8 | -4 | 6 |

Føroyskir leikarar: Claus Bech Jørgensen (Coventry)